Almanna- og bústaðamálaráðið

Dagfesting:	05.05.2026
Mál nr.:	26/00385-35
Málsviðgjørt:	LP
Ummælistíð:	21.01.2026 - 30.01.2026
Eftirkannað:	27.04.2026

Uppskot til

Løgtingslóg
um
fyrra byggistig í verkætlan um at byggja tvey sambýlir í Miðvági til fólk við ávikavist menningartarni og samansettum avbjóðingum, harímillum autismu, og til fólk við sálarligum og sosialum avbjóðingum

§ 1. Landsstýrisfólkinum verður heimilað at fara undir fyrra byggistig í verkætlan um at byggja tvey sambýlir í Miðvági til fólk við ávikavist menningartarni og samansettum avbjóðingum, harímillum autismu, og til fólk við sálarligum og sosialum avbjóðingum. Fyrra byggistig fevnir um at dagføra og umvæla ognirnar á Leitisvegi 70.
Stk. 2. Útreiðslurnar til fyrra byggistig kunnu í mesta lagi vera 20,9 mió. kr.

§ 2. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og fer úr gildi 1. januar 2032.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Ein verkætlan við tveimum byggistigum

Endamálið við uppskotinum er at heimila landsstýrisfólkinum at fara undir byggistig 1 í eini verkætlan við tveimum byggistigum, har tað fyrra byggistigið (byggistig 1) snýr seg um at dagføra og umvæla eina ogn á Leitisvegi 70 í Miðvági, ið skal nýtast sum sambýli við 7 plássum til fólk við menningartarni og samansettum avbjóðingum, harímillum autismu, meðan seinna byggistigið snýr seg um at byggja eitt nýtt sambýli við 12 plássum til fólk við sálarligum og sosialum avbjóðingum á matr. nr. 149n í Miðvági – Sambýlið í Birtulíð.

Tvær byggiskráir eru fyri samlaðu verkætlanina, onnur fyri ognirnar á Leitisvegi og hin fyri nýbyggingina á matr. nr. 149n – Sambýlið i Birtulíð.

Ætlanin er, at byggingin fer fram í tveimum stigum í tíðarskeiðinum 2026–2029.

Sambýlini á Leitisvegi og í Birtulíð eru liðir í einum størri arbeiði at niðurleggja smærri stovnar, sum ofta eru í ótíðarhóskandi sethúsum, og ístaðin byggja betri sambýlir, sum eru bygd til endamálið. Nýggju sambýlini koma ístaðin fyri trý sambýli í Vágunum, sum í dag húsast í trimum ymiskum sethúsum, sum ikki eru bygd til endamálið. Sethúsini hóska ikki at nýta sum sambýlir, og talan er sum heild ikki um nakra góða og virðiliga loysn til varandi heim.

Hetta uppskotið til verklagslóg fevnir bara um byggistig 1 (Sambýlið á Leitisvegi), men ætlanin er, at tá byggistig 2 hevur verið í útboði, og kostnaðurin er kendur á heysti 2026, verður eitt ískoyti gjørt til hesa verklagslóg.

Sambýlið á Leitisvegi – byggistig 1

Lógaruppskotið heimilar landsstýrisfólkinum at fara undir at dagføra og umvæla verandi ognir á Leitisvegi 70.

Í sambandi við fyrireikingar at byggja Sambýlið á Leitisvegi bleiv ein ogn keypt til verkætlanina. Ognin er á Leitisvegi 70 í Miðvági og fevnir um eina íbúðarlon við sjey íbúðum, sum eru bygdar í 1987 og umvældar í 2022. Harafturat er ein verkstaðarbygningur og ein millumbygningur, báðir bygdir í 1940.

Lonirnar við íbúðunum skulu umvælast og dagførast. Talan er um smærri umvælingar. Millumbygningurin skal takast niður, og verkstaðarbygningurin, ið skal nýtast til m.a. felagshøli, starvsfólkarúm og køk, skal høvuðsumvælast.

Byggistig 1 er nærri lýst í byggiskránni fyri Leitisveg, ið er lagt við sum fylgiskjal 1 til lógaruppskotið.

1.2. Galdandi lóggáva

Eingin lóggáva er á økinum.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við lógaruppskotinum er at geva landsstýrisfólkinum heimild at brúka upp til 20,9 mió. kr. uppá byggistig 1 í verkætlanini, ið snýr seg um at fyrireika, dagføra og umvæla ognirnar á Leitisvegi 70.

Yvirskipaða endamálið við lógaruppskotinum er at betra um bústaðarumstøðurnar hjá fólki við menningartarni og autismu og harvið geva teimum virðiligari umstøður at virka og trívast í.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Við lógaruppskotinum fáa fólk við menningartarni og autismu møguleika at flyta í ein meira tíðarhóskandi bústað, sum í størri mun egnar seg til teirra tørv. Øll fáa tey egna íbúð, egna inngongd og egið baðirúm.

Byggistig 1 fevnir um at umvæla tær sjey íbúðirnar á Leitisvegi 70 til fólk, ið hava samansettar avbjóðingar, harímillum menningartarn og/ella autismu. Fólkini hava í sambandi við vatnskaða í Sørvági áður búð í lonini á Leitisvegi, sum er hóskandi til teirra. Ein íbúð verður til fólk, ið eru serliga viðkvom fyri óljóði og gangi, og kemur ístaðin fyri serskipan, sum hevur verið í Sørvági.

Umframt at umvæla íbúðirnar, fevnir byggistig 1 eisini um at heildarumvæla verkstaðarbygningin, at taka niður ein millumbygning, ið er ímillum lonina við íbúðunum og verkstaðarbygningin, og at gera uttanumøki.

Bygningarnir, sum skulu umvælast og dagførast, eru samanlagt á leið 720 m2. Afturat hesum er stórt parkeringsøki. Við hesum ber til, við tíðini, at víðka um virksemið.

Byggistig 2 verður á matr. 149n, ið er keypt til endamálið. Grundøkið er 4.841 m^2 og er keypt frá Vága kommunu. Her verður bygt sambýli við 12 íbúðum í tveimum eindum við atgongd til felagshøli við felagskøki umframt starvsfólkaøki.

Fyri at minka um váðar við byggingini, varð byggibúningin fyri matr. nr. 149n boðin út í februar 2026, soleiðis at arbeiðið kundi byrja í mars 2026 og verða liðugt á sumri 2026. Við hesum kann heildararbeiðstakari arbeiða víðari eftir summarfrítíðina.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Lógaruppskotið hevur verið til ummælis hjá:

- Almannaverkinum
- MEGD
- Javna
- Sinnisbata
- Pedagogfelagnum
- Brekumboðnum
- Fíggjarmálaráðnum
- Landsverki

Hoyring fór fram í januar 2026. Skipað varð fyri hoyringarfundi og framløgu, tá MEGD, Javni, Sinnisbati, Pedagogfelagið, Brekumboðið, Almannaverkið og Landsverk vóru til staðar. Lógaruppskotið, byggiskrá, lendis- og skipanarætlan fyri økið í Miðvági og tíðarætlan hava verið til ummælis.

Eftir fundin varð avgerð tikin um at broyta verkætlanina, soleiðis at tað gjørdist meira greitt, at talan var um bygging til ymiskar málbólkar, og at hesi á ongan hátt skulu búgva í sama sambýli.

Mett verður, at hesar broytingar stuðla enn meira undir tað, sum áhugafeløgini hava víst á, um ikki at blanda málbólkar, og tí er støða tikin til at kunna feløgini heldur enn aftur at senda til ummælis.

Viðgerð av viðmerkingunum
Táverandi Almanna- og heilsumálaráðið fekk í januar 2026 viðmerkingar frá Javna.

Javni viðmerkir, at tað er av stórum týdningi fyri sambýlini, at atlit eru tikin at tí, at talan er um ymiskar málbólkar. Síðani hevur landsstýriskvinnan tikið støðu til at býta økini enn meira sundur, so at talan verður um tvey sambýli, sum ongar felagsfunktiónir fara at hava.

Javni vísir eisini á, at arbeitt eigur at vera við at lata fólk á sambýlinum hava húsdjór, um tey ynskja tað. Almannaverkið er tilvitað um hesi ynski, og um ta jaligu ávirkan hetta kann hava á fólk, og arbeiðir tí við eini ætlan um, hvussu hetta vónandi við tíðini kann gerast ein møguleiki.

Víst verður harafturat á týdningin av skipan, støddd og goymslumøguleikum, og afturat tí á, at fólk skulu kunna eldast og verða búgvandi hóast teirra støða og umstøður broytast. Atlit eru tikin at hesum í byggiskránni fyri bæði sambýlini.

Av tí at lógaruppskotið hevur verið til ummælis, áðrenn endalig prosjektering fyri verkstaðarbygningin er gjørd, hevur bygginevndin havt møguleika at viðgera og taka til sín viðmerkingarnar frá hoyringspørtunum, og fara at hava atlit í tann mun tað er møguligt uttan at dýrka um verkætlanina. Eitt nú fer at bera til at hava goymslu í verkstaðarbygninginum.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri landið.

Higartil eru brúktar á leið 12,4 mió. kr. tilsamans fyri byggistig 1:

- 11,9 mió. kr. eru brúktar til at keypa ognina á Leitisvegi
- 0,45 tús. kr. higartil brúktar til fyrireiking

Landsverk hevur gjørt eina kostnaðarmeting fyri byggistig 1, t.e. kostnaðurin av at dagføra íbúðabygningin, taka millumbygningin niður og heildarumvæla verkstaðarbygningin.

Kostnaðarmetingin er gjørd við støði í byggiskrá. Av tí at tað er tíðliga í tilgongdini, kunnu tillagingar væntast, so hvørt verkætlanin mennist.

Talan er um niðurtøku, umvælingar og dagføringar av verandi bygningum. Arbeiðið verður skipað í stigum og boðið út í smærri arbeiðstøkum.

Í mió. kr.	**Byggistig 1**
Keyp av Leitisvegi 70	11,9
Fyrireiking	0,45
Higartil er brúktar tilsamans	***12,4***
Dagføra og umvæla verandi bygningar á Leitisvegi 70 við heimild í verklagslóg *meting*	20,9
Tilsamans	**33,3**

Afturat hesum eru 1,6 mió. kr. brúktar til at keypa lendið á matr. nr. 149n til byggistig 2, og byggibúningin av lendinum boðin út sum framskotin arbeiðstøka. Hetta er gjørt fyri at minka um váðar og fyri at tryggja betri grundarlag fyri komandi heildararbeiðstøku. Arbeiðið varð boðið út í februar 2026, soleiðis at arbeiðið kundi byrja í mars 2026 og verða liðugt á sumri í 2026. Kostnaðurin av hesum verður væntandi 2,6 mió. kr.

Samlaði kostnaðurin fyri byggistig 2 verður lýstur, tá ískoyti verður gjørt til hesa verklagslóg.

Tá bæði byggistigini eru liðug, fara sambýlini, íroknað húsavørð og køksfólk, og við trimum eyka búplássum, at hava øktan rakstur við sær á umleið 1,3 mió. kr. Tó verður eindarkostnaðurin munandi bíligari. Sambærligi eindarkostnaðurin fer úr 1,1 mió niður í 897 tús. kr. Sí fylgiskjal 3.

Í løtuni eru tað 16 sambýlispláss/serskipanir á trimum stovnum. Eftir ætlan fara nýggju sambýlini (byggistig 1 og 2) at hava 19 pláss tilsamans, 7 pláss á Sambýlinum á Leitisvegi og 12 pláss í Birtulíð.

Almannaverkið hevur mett um kostnaðin at reka bæði sambýlini. Árligi rakstrarkostnaðurin er í dagsins prísum mettur at vera umleið 18,412 mió. kr. netto. Umframt eru eingangsútreiðslur

í sambandi við flyting og stovnan mettar at vera 660 tús. kr. Út frá dagsins prísum verður dagsprísurin 2.655 kr. pr. búfólk.

Tey trý sambýlini, ið flutt verður úr, tá ið Sambýlið á Leitisvegi og Sambýlið í Birtulíð eru liðug, eru tvey leigumál og ein ogn hjá landinum. Leiguútreiðslurnar eru fyri annað, ið er 271 m2, er 184 tús. kr. um árið, og fyri hitt, ið er 325 m2, 182 tús. kr. um árið. Sambært verandi tíðarætlan, kann eina leigumálið uppsigast í desember 2026. Hitt leigumálið og ognin hjá landinum kunnu væntandi uppsigast/seljast, eftir at verkætlanin er endaliga liðug, og øll fólkini kunnu byrja at flyta væntandi við ársbyrjan 2029.

Ognin, sum er á Traðarvegi 34, Sandavágur, verður eftir ætlan seld, tá fólkini sum búgva her eru flutt. Ilt er at meta um søluprísin. Landsverk hevur gjørt eina meting út frá, hvat líknandi ognir verða seldar fyri í hesum økinum. Mett verður at søluprísurin er umleið 5 mió. kr.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Lógaruppskotið hevur við sær økt virksemi fyri byggivinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur sum frálíður jaligar avleiðingar fyri umhvørvið, tí Almannaverkið ætlar at leggja inn grønar málarar og løðistøðir til el-bilar, so at infrastrukturin á Almannaverkinum kann tillagast, so at gjørligt verður at leggja um til el-bilar ístaðin fyri verandi bensin- og diesel-bilar.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur jaligar avleiðingar fyri tey, ið fara at búgva í sambýlunum. Bústaðarumstøðurnar vera munandi betri, eitt nú fáa øll egna íbúð við egnum vesi og baðirúmi. Sambýlini verða bygd til endamálið og til tann tørv, fólkini hava.

Mánaðarliga húsaleigan verður ásett í stigaskipan, ið er góðkend av landsstýrisfólkinum, og verður ásett í mun til stødd og dygd eftir góðkendum leisti, sum er galdandi, tá fólkini flyta inn.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Ongir millumtjóðasáttmálar eru á økinum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Lógaruppskotið stuðlar undir ST-sáttmálan um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek. Sáttmálin varð settur í gildi fyri Føroyar tann 23. august 2009.

Sambært grein 28 í breksáttmálanum viðurkenna limalondini, at fólk, ið bera brek, hava rætt til nøktandi lívskor og tískil eisini rætt til nóg góðan bústað. Somuleiðis viðurkenna limalondini, at fólk, ið bera brek, sleppa upp í almenn bústaðartiltøk.

Lógaruppskotið er eitt stig á leiðini at liva upp til hesa áseting.

2.9. Markaforðingar
Ongar markaforðingar eru á økinum.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skattir ella avgjøld.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur ikki fólki skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið heimilar landsstýrisfólkinum at nýta upp til 20,9 mió. kr. til at dagføra verandi ognir á Leitisvegi 70.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

Ein avtala er gjørd millum Vága Kommunu og landið um, at ein almenn gøta gongur ígjøgnum ovara part av matr. nr. 149n. Henda avtala er tinglisin á ognina sum ein gøturættur, ið liggur opin fyri almenninginum. Somuleiðis er eitt eldri seyðahús, ið skal varðveitast á ognini, matr. nr. 149n. Gøtan verður projekterað av heildararbeiðstakara í samráð við byggiharra, Vága Kommunu og brúkara.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Ja	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Ja	Ja	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Greinin heimilar landsstýrisfólkinum at fara undir fyrra byggistig av í alt tveimum byggistigum fyri Sambýlið á Leitisvegi (byggistig 1) og Sambýlið í Birtulíð í Miðvági (byggistig 2).

Byggistig 1 snýr seg um at umvæla og dagføra keypta ogn á Leitisvegi 70 í Miðvági við í alt sjey íbúðum, at taka niður millumbygningin og heildarumvæla verkstaðsbygningin.

Útreiðslurnar fyri byggistig 1 kunnu í mesta lagi vera 20,9 mió. kr.

Kostnaðarmetingin, sum Landsverk hevur gjørt, er grundað á byggiskrá, verandi umstøður og forkanningar. Metingin rúmar útreiðslur í sambandi við at dagføra og umvæla ognirnar á Leitisvegi, at taka niður millumbygningin, og at heildarumvæla verkstaðarbygningin.

Útreiðslurnar eru býttar yvir ár

Ár	**2026**	**2027**	**2028**
Útreiðslur	9,1 mió. kr.	10 mió. kr.	1,8

Til § 2
Greinin er gildiskomuregla og sólseturáseting. Løgtingslógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og hon fer úr gildi 1. januar 2032.

Ásetingin tekur støði í byggiætlanini og teimum royndum, sum eru gjørdar seinastu árini, sum vísa á, at seinkingar, ið ikki víðka fíggjarkarmin, aloftast koma fyri.

Sambært tíðarætlanini, sum Landsverk hevur gjørt, verður byggistig 1 liðugt í 2028 og byggistig 2 á sumri 2029. Samanlagt eru 20 mánaðir settir av til byggistig 1.

Landsverk metir, at tað er nøktandi tíð undir vanligum umstøðum at dagføra og umvæla tílíkan bygning.

Verkætlanartíðarætlanin leggur ikki upp fyri seinkingum í byggingini. Tíðarætlanin leggur tó upp fyri møguligum døgum í vetrarhálvum, tá ikki fer at bera til at arbeiða.

Almanna- og bústaðamálaráðið, 5. mai 2026

Margit Stórá
landsstýriskvinna

/ Eyðun Mohr Hansen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Byggiskrá fyri Sambýlið á Leitisvegi
Fylgiskjal 2: Tíðarætlan fyri sambýlini á Leitisvegi og í Birtulíð í Miðvági
Fylgiskjal 3: AV rakstrarkostnaður
Fylgiskjal 4: Hoyringarskriv frá Javna